Atlantsflog yvirtekur íslandsflúgvingina

Atlantsflog fer einsamalt at røkja íslandsflúgvingina í vetur. Hetta er fyrstu ferð í 40 ár, at Icelandair ikki flýgur millum Ísland og Føroyar. Eisini fer Atlantsflog at lækka prísin fyri at flúgva millum londini

Tað skal gerast lættari og bíligari hjá føroyingum at vitja Reykjavík, sigur Magni Arge, stjóri á Atlantsflog, sum ætlar at lækka prísin á flogferðaseðlum millum Vágar og Reykjavík

Mynd: Edvard Joensen

FLOGFERÐSLA

Edvard Joensen
edvard@sosialurin.fo

Vágar:
Atlantsflog fer í vetur at flúgva tvær ferðir um vikuna millum Vágar og Reykjavík. Icelandair, sum byrjaði flúgving upp á Føroyar í 1963, fer fyri fyrstu fer í 40 ár ikki at senda flogfar til Føroya. Og tað verður eftir ætlan bíligari at flúgva millum londini, sigur stjórin á Atlantsflogi.

Tað verða fleiri setur á flogrutuni millum Vágar og Reykjavík í vetur, enn tað hava verið undanfarnar vetrar.

Hetta kemst av, at Atlantsflog einsamalt fer at røkja fúgvingina við sínum flogførum, sum taka 83 ferðafólk, og at Icelandir ikki sendir síni flogfør, sum taka eini 46-48 fólk, millum londini.

Hetta kann hava ymsar fyrimunir við sær, sigur Magni Arge, stjóri á Atlantsflogi. Fyrst og fremst tann, at tað fer at bera betri til hjá størri ferðaløgum at ferðast um vikuskiftini millum londini.

Fyrr var tað soleiðis, at tú kundi koma út fyri, at tey reiðiliga 80 fólkini, sum Atlantsflog kundi senda til Íslands fríggjakvøld, ikki øll sluppu heim aftur mánadag, tí íslandsflogfarið, sum tá fleyg, bara tók stívliga helvtina av tí, flogfarið hjá Atlantsflogi tekur.

Tann trupulleikin er nú ikki til staðar, vísir Magni Arge á og heldur, at tað skuldi so verið ein góð grund til at gjørt túrin.

Ein onnur rættiliga góð grund er, greiðir hann frá, at Atlantsflog hevur rættiliga spennandi ætlanir, sum fara at gerast veruleiki seinni í hesum mánaðnum.

Atlantsflog hevur ætlanir um at lækka prísin fyri flúgving millum Føroyar og Ísland.

Tað kann lata seg gera við at vinna munin inn aftur við hægri ferðafólkatali, sigur Magni Arge, sum trýr uppá, at tað ber til.

Tað er nú kortini ikki so, at íslendingar heilt hava drigið flogfør síni í hangarin og ongantíð ætla sær at flúgva til Føroya aftur.

Sambært Magna Arge verður arbeitt við einí ætlan um møguliga at økja um »frekvensin«, sum tey nevna tað - túratalið - úr tveimum til tríggjar um vikuna einaferð í framtíðini. Um so verður, verður tað helst til, at Icelandair fer at flúgva ein túr mitt í viku, og Atlantsflog so er at taka sær av teimum báðum túrunum báðumegin vikuskiftið, sigur hann.

Hóast íslendska flogfarið ikki fer at flúgva í vetur, hava íslendingar kortini ikki slept flúgvingini heilt, vísir Magni Arge á. Samstarvað verður millum føroyingar og íslendingar soleiðis, at íslendingar framvegis eiga nøkur setur í flogfarinum.

Magni Arge ger vart við tann stóra prísmunin, sum er á fráferðunum úr Reykjavík og úr Vágum.

Íslendingar eru so stórsinnaðir, sigur hann, at teir rokna Føroyaflúgvingina sum innanríkiflúgving hjá teimum. Av tí sama taka teir bara 16,- krónur í avgjaldi fyri hvørt ferðafólkið ,sum fer um flogvøllin í Reykjavík til Føroya. Tá flogið verður hinvegin - ella fyri tann skuld nakra aðrastaðni úr Vágum - verður avgjøld upp á 250,- krónur fyri hvørt ferðafólkið álagt, vísir Magni Arge, stjóri í Atlantsflogi á.

Barnadansur í tjúgu ár

Javngamalt við Norðurlandahúsið er tiltakið Brnadansur, sum í kvøld byrjar fyri tjúgunda árið á rað. Hetta er drúgvasta samanhangandi tiltakið í Norðurlandahúsinum

DANSUR

Edvard Joensen
edvard@sosialurin.fo

Enn ein dansivetur við barnadansi í Norðurlandahúsinum byrjar nú aftur.

Eins og alt annað verður føroyskur dansur lærdur best frá barni av. Tað hava Norðurlandahúsið og Dansifelagið í Havn sanna og skipa nú á 20. ári á rað fyri barnadansi í Norðurlandahúsinum.

Í kvøld klokkan 20 byrjar barnadansurin í Norðurlandahúsinum aftur fyri veturin, sum hann hvur gjørt øll hesi 20 árini. Barnadansurin, sum Norðurlandahúsið og Dansifelagið hava skipað fyri øll hesi 20 árini, er drúgvasta tiltakið í søgu Norðurlandahúsins.

Kvæðini og føroyski dansurin eru berandi partur í mentan okkara, og endamálið við barnadansinum í Norðurlandahúsinum er at læra børnini kvæðini og kvøðing og soleiðis at menna áhuga teirra fyri dansi og kvøðing sum livandi parti av føroyskari mentan.

Norðurlandahúsið heitir á børn og foreldur um at møta Fjølment til dansin í Norðurlandahúsinum í kvøld klokkan 20.

Barnadansur hevur í 20 ár verið á skránni hjá Norðurlandahúsinum. Hetta er drúgvasta tiltakið í húsinum yvirhøvur

Tunga ferðslan til ampa fyri børnini

Fólk, sum eiga børn og búgva við vegin millum Bakaríið í Fuglafirði og Vónina vilja hava vegforðingar, tí tey ræðast tungu ferðsluna sum koyrir til og frá havnaøkinum

Á hesum vegastrekki er smalt, men her er samstundis nógv tung ferðsla – til og frá havnalagnum. Tey, sum eiga børn og búgva við vegin, vilja hava vegforðingar, soleiðis at ferðin hjá bilunum verður minni

Mynd: Vilmund Jacobsen

FERÐSLA

Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo

Menning setir síni krøv, eisini til vegirnar. Har trongligt er í bygdum øki, kann vera torført at loysa trupulleikarnar, tá ið nógv og tung ferðsla fer fram við.

Fólk, sum eiga børn og búgva við vegin millum Bakaríið og Vónina í Fuglafirði, eru ikki trygg við umstøðurnar, nú stórir og tungir bilar dagliga ferðast oman og niðan á havnaøkið.

Soleiðis hevur tað verið í fleiri ár, men so hvørt virksemið økist, økist ferðslan eisini.

Næstan…

- Vit vita um hendingar, har børn næstan hava ligið undir bilunum. Í tí eina førinum var barnið á súkklu og koppaði undan bilinum. Tað var eftir eina slíka hending, at vit við undirskriftum vendu okkum til kommununa um at fáa vegforðingar á vegin, soleiðis at ferðin - ikki minst hjá lastbilum og trailarum - verður minni.

Fólk, sum búgva á hesum vegastrekki í Fuglafirði, siga, at kommunan í fyrstu syfti tók undir við teimum og segði seg vilja minka um ampan við vegforðingum.

- Men nú hava vit skilt, at hesar ætlaninar eru sleptar. Nú verður tosað um gonguteig í staðin, men vit duga illa at síggja, at pláss er til gonguteig á vegnum, sum ikki er serliga breiður.

Eini 11 børn úr 8-9 árum og yngri búgva við nevnda vegastrekkið. Flestu børnini eru millum 4 og 5 ár.

- Skal gonguteigur gerast á hesum vegastrekki, verður neyðugt at taka eitt ella tvey hús niður, samstundis sum neyðugt verður at taka burtur av gørðum, sum liggja fram við ovaru síðu á vegnum.

Skjótari…

Í Fuglafirði siga tey, at bert ein lítil partur av ferðsluni til og frá havnalagnum koyrir oman longur inni í bygdini, tí bilførararnir eftir øllum at døma ikki vilja geva sær stundir at koyra eftir bryggjuni.

- Tað er skjótari hjá teimum at koyra úteftir tí gamla bygdavegnum og út á havnaøkið.

Fólk, sum búgva á hesum vegastrekki í Fuglafirði, halda, at einar 2-3 forðingar høvdu tikið nógv av ferðini, sum tunga ferðslan, ið strýkur fram við, hevur.

- Her koyra nógvir lastbilar og trailarar, og tað er greitt, at hesir eru til ampa fyri børnini í grannalagnum. Tí heita vit á kommununa um at taka neyðug stig beinanvegin, soleiðis at vit, sum búgva millum Bakaríið og Vónina, kunnu kenna okkum tryggari.

Sosialurin fer at venda aftur til málið í komandi blaði.

Nú landa teir aftur fisk á Eiði

Í seinastuni hevur veðrið verið so vánaligt, og tí hevur lítil fiskur verið á marknaðinum

FISKIVINNA

Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo

Eiði: Partrolararnir, Dragasund og Akranes, sum eru fyrrverandi Sardis og Topas, landaðu ávikavist á Eiði og í Leirvík mikudagin. Teir høvdu tilsamans 100.000 pund, harav meginparturin var upsi.

Síðan krøvini til landing vórðu broytt, hevur í eina tíð eingin landing verið á Eiði. Men fyri einum mánaða síðan fóru teir aftur at landa eftir, at Norðís Seafood hevur bøtt um umstøðurnar og fingið sína góðkenning uppá pláss aftur.

Hýsa og upsi

Eini 30 fólk arbeiða á Norðís, og fiskaarbeiði er rættiliga stoðugt.

- Vit arbeiða serliga hýsu og upsa, sum fer til portiónir og fløk.

Á Eiði siga tey, at meginparturin av ráfiskinum verður keyptur á uppboðssølu, men nú teir aftur kunnu landa á Eiði, landar onkur bátur beinleiðis til virkið.

Í løtuni er lítil fiskur á marknaðinum, tí veðrið hevur verið so vánaligt.

Upsin 15% dýrari

Hóast minni fiskur er á marknaðinum, bendir einki á, at hýsuprísurin er øktur nakað serligt í heyst, men prísurin á upsa er nú ikki so lágur, sum hann hevur verið í summar.

Á Eiði siga tey, at upsaprísurin í løtuni liggur millum 3,50 og 3,80, og tað er øking uppá eini 50-60 oyru seinastu fjúrtan dagarnar.

- Nú prísirnir hava verið so lágir, er hetta ein stór øking í prosentum. Talan er helst um eina øking uppá eini 15-20%.

Vit kunnu leggja aftrat, at toskaprísurin hevur verið rættiliga góður í seinastuni